## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og stundum regn ella mjørki. Um kvøldið nakað minni vindur av vestri og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Hvassur vindur av útsynningi og suðri og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

# – Verið sum høgguslokkar

**Ummælið av Barometrinum, sum var í blaðnum týsdagin, var ikki meir enn hálvt. Einki varð sagt um teir, sum eiga stóran part av knossinum uppi í Útvarpshølunum.**

ÚTVARP
*Henny Olsen*

Týsdagin tann 9. september var eitt ummæli av sendingini Barometrinum í blaðnum. Har róstu vit teimum frálíku reportarunum, sum kundu finna upp á alt býtt. Men tó, so var ummælið ikki meir enn hálvt. Ikki eitt orð varð nevnt um teir, sum sótu í útvarpinum og knossaðu, og tað er ikki rætt.

– Rúni og Bjarni hava verið grundarsteinurin. Tað hevði einki verið uttan teirra skipan og samskipan úr studionum, fáa vit at vita frá Hera Jakobsen, sum er ein av Barometur-reportarunum. – Bjarni hevur einsamallur sitið og stýrt hvørjum tí einasta knøtti uttan hjálp frá teknikarunum. Hann hevur trúliga verið sum ein høgguslokkur.

Og rætt mugu vit geva Hera. Teir, ið hava lisið allar spurningarnar og syrgt fyri øllum í Útvarpinum, mugu vit als ikki gloyma. Reportarirnir fingu tey flestu at flenna í kíki við teirra spurningum og samrøðunum, og tískil er lætt at gloyma teir, sum kanska sita í Útvarpinum og flenna og ikki beinleiðis taka lut í samrøðunum. Men eitt vita vit, at høvdu Rúni og Bjarni ikki verið, so høvdu nokk eingir spurningar verið settir.

Við hesum vilja vit takka teimum, Elin, Kára, Hera, Rúna, Bjarna og øllum, sum á ein ella annan hátt tóku lut í Barometrinum, fyri eitt gott summar og vóna, at vit hoyrast aftur komandi summar. Og vit vilja biða Rúna og Bjarna orsaka, tí ikki var tað við vilja. Vónandi hoyra vit málið á tykkum næstu ferð, Barometrið vónandi fer í luftina.




*Øll manningin á væl umtókta Barometrinum*
*Mynd: Jens K. Vang*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 16 |
| Halifax | 18 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 20 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 12 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 25 |
| Róm | – |
| Malorca | 27 |
| Athen | – |
| Malta | 28 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 982 hPa – ex »FABIAN« – í útsynning úr Íslandi, fer móti Hvarvinum og dýpist. Eitt annað lágtrýst, 1003 hPa. sunnan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og grynnist.




Lágtrýstið vestan fyri Írland fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/08 kl. 06[00]– 09/09 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í sept.: ÷0,5° Mesti hiti máldur í sept.: 19,5°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 08/09 kl. 06[00]–09/09 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 16,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

31. august: Mánin næstur jørðini
10. sept.: Fullmáni
16. sept.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. sep | 07.17 | 19.39 | 06.17 | 18.39 | 06.32 | 18.54 | 09.17 | 21.39 | 10.17 | 22.39 | 05.32 | 17.54 | 04.32 | 16.54 | 07.32 | 19.54 | 08.32 | 20.54 | 07.02 | 19.24 | 08.17 | 20.39 |
| 11. sep | 08.01 | 20.21 | 07.01 | 19.21 | 07.16 | 19.36 | 10.01 | 22.21 | 11.01 | 23.21 | 06.16 | 18.36 | 05.16 | 17.36 | 08.16 | 20.36 | 09.16 | 21.36 | 07.46 | 20.06 | 09.01 | 21.21 |
| 12. sep | 08.42 | 21.02 | 07.42 | 20.02 | 07.57 | 20.17 | 10.42 | 23.02 | 11.42 | — | 06.57 | 19.17 | 05.57 | 18.17 | 08.57 | 21.17 | 09.57 | 22.17 | 08.27 | 20.47 | 09.42 | 22.02 |
| 13. sep | 09.22 | 21.41 | 08.22 | 20.41 | 08.37 | 20.56 | 11.22 | 23.41 | 00.02 | 12.22 | 07.37 | 19.56 | 06.37 | 18.56 | 09.37 | 21.56 | 10.37 | 22.56 | 09.07 | 21.26 | 10.22 | 22.41 |

5 707265 100036 >